LM-099/2023

Fylgiskjal 65

ÚTOYGGJAFELAGIÐ

Útoyggjafelagið
Gerðavegur 13
513 Syðrugøta
Tlf. 292592
utoyggj@gmail.com
www.Utoyggj.fo

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

20.02.2024

Hoyringarsvar til:

Uppskot til Løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)
Mál nr.: 23/25394

Hetta svarskriv er gjørt í samstarv við umboðsráð felagsins, og fólk búsitandi á útoyggj.

Ferðavinnan er góð, um hon verður væl skipað og bygd á lokalt grundarlag, lokalan áhuga og samstarv. Ferðavinnan er við at festa røtur í Føroyum, og summastaðni riggar hon væl, men ikki allastaðni. Felagið tekur tí undir við at gera rætningslinjur, ið skipa viðurskiftini í ferðavinnuni, og við serligum atlitið til útoyggjar og smápláss, so ferðavinnan ikki verður til ampa fyri fólk, fæ, náttúru, umhvørvi og okkara siðsøgu. Vit halda somuleiðis at tað skal verða møguligt hjá myndugleikum, at grípa inn, at fyribyrgja óhepnum støðum.

Útoyggjafelagið tekur tó **ikki** undir við tí uppskotið, sum fyriliggur nú. Vit meta ikki, at intentiónin í § 1, gongur aftur í lógartekstinum. Lógin er ein rammulóg, við nógvum leysum endum, og ov nógv viðurskiftið eru latin upp til óvissuna.

Vit meta at tað eru aðrar lógir, ið eiga at koma frammanundan hesari, eitt nú ein um landbúnað, ein um gongd í haga (hagalóg), ein, ið skipar atlit til náttúru og umhvørvi, og ein til frama fyri størri lokalum fólkaræði á útoyggj (broyting í kommunulógini).

Samanumtikið meta vit at lógaruppskotið, sum tað fyriliggur, ikki stuðlar undir menning á útoyggj, men heldur fer at viðvirka til at niðurlaga liviðumstøður, búseting og trivna.

Grundgevingar fyri okkara støðutakan

Ferðavinnan og gongd í haga
Vísandi til § 3 í uppskotinum, skal tað verða frítt hjá føroyingum at ganga í fjøru og haga, við atliti til umhvørvi og virksemi hjá bóndunum. Hesum stuðlar útoyggjafelagið, men metir at spurningurin um gongd í haga hjá føroyingum, ikki eigur at verða partur av ferðavinnulógini, men eigur at verða ásett í sjálvstøðugari lóg, einari hagalóg.

Sama kann sigast um § 4, har stk. 4, sum sigur at tað ikki er loyvt at taka hund við í hagan, uttan í samband við landbúnaðarvirksemi. Henda áseting gongur bara út yvir tey lokalu, ið eru von við at taka teirra hund við í hagan, í bandi, at forða hesum við lóg, bøtir ikki um trivnaðin.

Hvat viðvíkir ásetingina um atkomu við báti, vilja vit vísa á teir trupulleikar, ið útoyggjar hava av bátum, ið órógvar fuglin í bjørgunum.

Burðardygd

Lógaruppskotið verður kallað "burðardygg ferðavinna", og m.a. verður sagt í §4, at farast skal væl um náttúruna og umhvørvi og avmarkingar kunnu gerast í ferðafólkatalið og virksemi, um mett verð ur at náttúran, umhvørvi og mentunararvur er hótt/ur. Tað er tó ikki nøkur áseting í lógaruppskotinum um hvussu hetta skal tryggjast. Tað er heldur onki í lógini, sum vísir til sosiala burðardygd, sum er eitt sera avgerðandi evnið fyri útoyggjarnar.

Ábyrgdin at skipa ferðavinnuna verður løgd til kommunurnar. Hetta sæð í mun til náttúru og umhvørvið, er tað ikki ein gongd leið, tí tað er ongin loyna at peningaáhugamál koma fram um náttúru- og umhvørvisvernd, bæði hjá kommunum, vinnu og einstaklingum. Tí er neyðugt at leggja hesi viðurskiftið í eina náttúru- og umhvørvisverndarlóg, sum byggir á eina víðfevnda skráseting og kortlegging av føroysku náttúruna, gjørda av kvalifiseraðum fólkum.

Ein óheftur náttúru- og umhvørvisstovnur skal umsita økið. Stovnurin kann ráðgeva og vegleiða, í samband við ferðavinnuátøk og annað virksemi, ið skal fara fram í náttúruni, eins og góðkenna slíkt virksemi áðrenn tað verður sett í verk. Somuleiðis skal stovnurin hava heimild at áseta avmarkingar í ferðafólkatalið/ ferðavinnuvirksemi, eins og kunna friða økir í styttri ella longri tíðarskeið.

Leikluturin hjá kommununum

Í § 6 og 7, ið umrøður "ferðavinnuætlan", verður lagt upp til at kommunurnar skulu greina og gera ferðavinnuætlanir fyri øll økini. Hesar lógargreinar reisa fleiri spurningar enn svar, og haraftrat er spurningurin um heimildir, tí hesar eru ikki lagdar í lógina, men hanga í leysum lofti, í einari møguligari ætlan, ið eingin veit hvussu kemur at síggja út. Møguligar heimildir hjá teimum, sum varða av jørðini, mugu verða skrivaðar beinleiðis inn í lógina.

Fyri útoyggjar inniber hetta, at kommunurnar skulu standa fyri at gera ætlanir fyri oyggjarnar, og velja fólk til hesa uppgávu. Í Nýggjari spurnakanning, sum Útoyggjafelagið gjørdi í september 2023 millum útoyggjafólk (106 luttakara), svara 69% av teimum sum búgva í samanlagdari kommunu, at tey ikki kenna seg hoyrdan av kommununi og heldur ikki av staðbundnu nevndini. Í kommunum, ið ikki eru samanlagdar svara 39%, at tey ikki verða hoyrd í nóg stóran mun.

Tað, sum vit vilja siga við hesum er, at tað á ongan hátt skal verða kommunan, ið skal standa fyri at gera ferðavinnuætlanir, men skal gerast av teimum sum búgva og eru virkin í oynni, og stuðla av kommununi. Útoyggjarnar eru í serstøðu, tí tær eru so fámentar, og á slíkum smáplássum eru tað aðrar mentanir og hugsanarháttir galdandi, enn á meginøkini.

Útoyggjafelagið hevur ofta borið fram, at ein háttur at skipa lokalt fólkaræði er at seta á stovn bygdaráð við 5 til 7 limum, sum við fakligari hjálp, kunnu fara undir eina tilgongd at skipað oynna/bygdina bæði í mun til sosialan trivnað, og vinnu, her undir eisini ferðavinnu.

Eitt sum verður nógv brúkt, m.a. í Norra, er "Bygdemobilisering", eitt tiltak, ið hevði verið sera viðkomandi fyri føroysku útoyggjarnar, ikki minst í samband við at skipa ferðavinnuna. Her skal viðmerkjast at útoyggjafelagið arbeiðir við einari pilot verkætlan nevnd "ferðavinnan á lokar hendur", og hon snýr seg um hetta sama evnið.

Í § 8 verður víst til farleiðir. Her er okkara viðmerking, at vit eiga at brúka bygdagøturnar í mest møguligan mun. Um bóndi sjálvur velur at gera gøtu í egnum haga, er talan um ferðavinnutiltak, og eigur at góðkennast sum hetta (dømið: Kallsgarður á Trøllanesi). Tað merkir at bóndin sjálvur avgerð, hvussu hann skipar sína ferðavinnu, í samstarvi við loklsamfelagið. Sjálvsagt, samsvarandi lógum á umhvørvis- og náttúruøkinum.

Viðvíkjandi gjaldi, sum er nevnt § 13 og 14, ið øll ferðafólk, sum koma til Føroyar fáa álagt, metir felagið at hetta er í lagið. Tó meta vit ikki, at lokalar ferðavinnu ætlanir og tiltøk, har gjald verður lagt á tænastur, skulu víkja fyri hesum. Vit meta heldur ikki, at tað er rætt at deila peningin út til passivar aktørar.

Sostatt meta vit ikki, at býtið av pengum í uppskotinum er skynsamt. Okkara hugsan er, at hesin peningur skal tryggja, at Føroyar ikki forfarast av øktari ferðavinnu, og virkar fyri at verja náttúruna. Eisini halda vit at býtisháttur, har støð sum hava mest vitjanir fáa mest stuðul, ikki virkar fyri at spjaða ferðavinnuna. Eiheldur er hesin býtisháttur heppin, tá málið er at menna eina búseting á útoyggjum, ið gagnar framtíðini.

Ferðavinnan og landbúnaðurin
Ferðavinna er ein ótrygg vinna, tí hon er nógv ávirkað av búskaparligum sveiggjum, og aðrari ávirkan, lokalt og globalt. Sum tað framgongur í lógaruppskotinum (§ 5. Stk.2 og 3, og § 12 stk. 3) kemur ferðavinnan at hava framíhjárættindi í mun til m.a. jarðarbrúk. Hetta stríðir í móti endamálinum, at brynja Føroyar til størri matvørusjálvbjargni, har útoyggjarnar kunnu hava ein týðandi lut. Og lógin leggur í verandi uppskotið upp til, at pengaáhugamál á meginøkinum, kunnu yvirtaka og keypa upp jørð og ognir á útoyggj til ferðavinnu endamál (§ 10).

Tað eru longu dømir um, at kapitalsterkar fyritøkur (føroyskar og útlendskar) keypa hús og jørð upp, uttan nakrar treytir ella krøv. So hvørt sum føroyska ferðavinnan mennist, er eyðsýnt at áhugin at spekulera í ognum, eisini økist. Hetta er væl kent í útlondum, og tá kunnu bæði kommunur, lokala vinnan og privatpersónar verða freista til at selja. Tí er henda gongdin í § 10, ein beinleiðis hóttan í móti okkara mentan, landbúnaði og búsetingini sum heild. Tey lokalu ella fastbúgvandi, hava heldur ongan møguleika at kappast við tey fíggjarliga sterku á meginøkinum, og tí er vandi fyri at alt lokasamfelagið fer á avbygda ella útlendskar hendur.

Tá festijørðin bleiv umsetilig, og festini kundu kapitaliserast, flutti rætturin til jørð av útoyggjunum, og tey sum keypa jørð upp, fáa ræðið á hagapørtunum og náttúruni, ið liggur til bygdina. Sum hendan lógin er orðað (§ 5), kann hon eisini taka verandi rættindi frá bóndum, at reka landbúnað. Hetta tí at bóndin ikki hevur rættindi at siga nei til ferðavinnu, hóast bóndin er ímóti hesum virksemið. Her er eisini talan um virksemi, ið verður skipa á meginøkinum og útint á útoyggj ella á smáplássum í útjaðaranum. Kemur hetta í gildið, hevur lokalsamfelagið onga ávirkan.

Landbúnaðarpolitikkur
Nú liggur í kortum at gera eina nýggja landbúnaðarlóggávu. Hetta er týdningarmikið, serliga fyri útoyggjarnar, tí ein slík lóggáva má tryggja at góð landbúnaðarjørð verður brúkt og vekta sum tilfeingi fyri lokalsamfelagið, og harvið gagna búsetingini. Verður okkara landbúnaðarjørð/matjørð, fyrst nýtt til annað virksemið ella byggjarí, fæst hon ongantíð aftur til matjørð.

Eftir okkara tykki, eigur ein slík lóg at koma áðrenn ferðavinnulógina, tí tað kann ganga skjótt, at telva jørðina á útoyggj burtur til ferðavinnuna á meginøkinum. Somuleiðis eigur at skipast so fyri, at festijørð og ognarjørð koma undir somu reglur/lóg. Hetta er alt virðismikið tilfeingið, sum eigur at virka undir somu treytum og korum.

Vit eru somuleiðis ímóti, at ferðavinnuaktørar á meginøkinum, kunnu koma at reka ferðavinnu, á jørðini hjá øðrum, við m.a. standardavtalum, tilskilað í § 5 stk. 3. Tá jørð og ognir eru farnar til eigarar uttanfyri oynna, er onki at byggja lokalsamfelagið á longur.

Samanumtøka
Hetta uppskotið kann og skal ikki samtykkjast í tí líki, tað fyriliggur. Lógarteksturin er beinleiðis í andsøgn við inngangin, sum sigur at endamálið er at skapa menning og framgongd. Tað eru ongi viðurskifti í lógartekstinum, sum tryggja at lokalsamfeløgini hava fyrimunir, men øvugt, at rættindi verða flutt av oyggjum inn á meginøkið, til stórar ferðavinnuaktørar við kapitali í rygginum.

Tað er eisini ein stórur vandi í, at síggja ferðavinnuna sum ein avgerðandi fíggjarligan bul í lokalari menning. Ferðavinnan kann vera óstøðug og eigur tí at síggjast sum eitt ískoyti, har lokalu aktørarnir kenna seg væl og føla at tað er ein vinn vinn støða at taka í móti ferðafólki, og veita teimum eina tænastu.

Ferðavinna, ið verður skipa av avbygda aktørum, kann skjótt kvala alt tað sum útoyggjarnar eru, eitt nú friðarlig smásamfeløg, við ríkari søgu og mentan.

Vinnan má vaksa í trá við áhuga og ynski á staðnum, og sum orka er til. Ein hjálp at menna útoyggjarnar, eigur at byrja við, at tey sum ynskja at búgva á staðnum, fáa atgongd til bústað og jørð til framleiðslu, og at aðrar tænastur verða mentar til frama fyri trivnað og trygd.

Nakrar av útoyggjunum og bygdir í útjaðaranum eru longu nú hart troyttar av ferðavinnuni, og uppliva at tey onki ræði hava á bygdini, onga atgongd til bústaðir ella jørð, uttan at skula gjalda í kapping við kapitalsterk fólk á meginøkinum, og mugu boyggja seg fyri støðuni.

Hetta lógaruppskoti kemur ikki at rætta slíkar støður, men fer heldur at staðfesta hesa støðu við lóg. Hetta eru okkara grundgevingar fyri ikki at taka undir við lógaruppskotinum. Vit meta at lógaruppskotið ikki stuðlar undir at menna útoyggjarnar, men heldur øvugt.

Tørvir er á at gera eina politiska ætlan fyri menning av útoyggjum. Eina ætlan, ið styrkir búsetingina við bústaðarmøguleikum, betri samferðslu og tænastum, og atgongd til tilfeingið á staðnum.

Lat okkum steðga á og geva tíð til umhugsan og eina demokratiska tilgongd, har allir steinar verða vendir, til frama fyri eina góða ætlan og eitt lógarverk, sum livir upp til føgru orðini í innganginum.

Vit eiga at steðga við at eggja fleiri ferðafólkum at koma til Føroyar, og í staðin brúka pengar og orku uppá at fáa øll tey nevndu ógreiðu viðurskiftini í rættlag. So kann farast undir eina varisliga tilgongd, sum samfelagið, og ikki minst útoyggjarnar kunnu megna.

Vegna Útoyggjafelagið

Óla Jákup úr Dímun, formaður og

Olga Biskopstø, samskipari